Nordic Sustainable Construction

# Læraravegleiðing: 2.3.2 Konstruktiónstekning

## Evni

- Snið til sundurbýti
- Hugskotsmenning
- Skitsa og konstruktiónstekning

## Mælt tíðarskeið

180 min

## Viður

Undirvísingartilfartil skeið um endurnýtsluviður í bygging

## Innleiðsla

Í hesum skeiði skal lærlingurin gera konstruktiónstekningar við fokus á snið til sundurbýti. Tekningarnar verða nýttar seinni í modul 2.4.2, har lærlingurin fer at byggja eina mock-up út frá tekni- og skitsutilfarinum.

Lærlingurin verður kendur við snið til sundurbýti við viði. Gjøgnum ymisk dømi verða møguleikar og verklagsroyndir vístar sum íblástur. Yvirskipað eiga dømini at geva lærlinginum eina innleiðslu til evnið í mun til hansara yrki og eina fatan av, hvat ger, at ein trækonstruktión kann skiljast sundur og endurnýtast við tíð.

## Fyrireiking

Leiklutin hjá læraranum:

•Lærarin skal greiða frá endamálinum.

•Lærarin skal greiða frá uppgávuni.

•Lærarin skal samstarva við næmingarnar undir venjingini og hjálpa við tekningini.

•Lærarin skal meta og geva afturboð til næmingarnar.

Leiklutin hjá lærlinginum:

•Lærlingurin skal lurta og skilja uppgávuna.

•Lærlingurin skal leita eftir upplýsingum um snið til sundurbýti.

•Lærlingurin skal gera skitsur og konstruktiónstekningar til seinni praktisku uppgávu 2.4.2.

•Lærlingurin skal taka ímóti afturboðið frá læraranum.

## Læringamál

•Lærlingurin kann meta um, ein serlig lærugreina konstruktión er ”snið til sundurbýti" (H2).

# Læraravegleiðing: 2.3.2 Konstruktiónstekning

- Lærlingurin kann gera snið til trækonstruktiónir, so at serliga útsettir konstruktiónsliðir kunnu verða skiftir út "lætliga" (offervirka) (F2).
- Lærlingurin kann vísa, hvussu konstruktiónir kunnu verða gjørdar fyri at minka um spill (V2).

## Innihald og endamál

Lærlingurin ger tekningar til eina mock-up, sum vísir, ymiskar serligar lærugreina knútapunktsloysnir, sniðaðar til sundurbýting.

## Uppskot til undirvísingarætlan

<u>Framløga hjá læraranum (10 min)</u>

•Framløga av læringarelementi.

•Hygg at sjónbandið 2.3.1 – Snið til sundubýti.

<u>Einstaklings arbeiði (10 min)</u>

•Lærlingurin hugsar um støður úr sínum egna gerandisdegi, har tilfar og konstruktiónir eru torfør at taka niður.

•Greið frá og kjakast um tykkara royndir og loysnir í flokkinum.

<u>Arbeiði í bólkum av 2 persónum (120 min)</u>

•Bólkurin kannar og leggur 3 skitsufyrispurningar fram fyri konstruktiónir ella byggipartar, sum kunnu takast niður og endurnýtast.

•Bólkurin velur eina skitsu at arbeiða víðari við.

•Bólkurin ger endaligar konstruktiónstekningar, sum verða nýttar í modul 2.4.2.

<u>Framløga og endi (30 min)</u>

•Leggið tykkara endaligu hugskot og tekningar fram fyri flokkin og læraran.

•Metið modulið í flokkinum og komið við uppskotum til betranir.

## Sundurgreining

•Fyrir lærlingar við avbjóðingum finnur lærarin dømi, sum næmingurin kann arbeiða við.

•Teir meira sjálvstøðugu lærlingarnir kunnu avbjóðast, tá ið tað kemur til umfatandi og nágreiniligheit í uppgávuni.

•Talið av tekningum og loysnum kann variera millum bólkarnar.

## Afturboðan og meting

Lærarin gevur afturboð undir arbeiðsgongdini og samanumtøka av uppgávuni.